# ítróttur

Nr. 197 • leygardagur • 15. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# TB og VB í somu gongu

**Í dag fara suðuroyarfeløgini at ganga í somu skrúðgongu, og í morgin fara tey á Sevmýri at stríðast um at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í dag fara fótbóltsspælararnir í Vági og á Tvøroyri at ganga í somu skrúðgongu. Tað fara teir í sambandi við móttøkuna av Smyrli. Øll ítróttarfólkini eru stevnd at vera við í móttøkuni.

VB og TB eru ávikavíst niðast og næstniðast á støðutalvuni. Málið er ikki formliga viðgjørt í feløgunum, og tí er sjálvandi eingin avgerð tikin. Men tað er ein sannroynd, at tað tær seinastu vikurnar hevur verið nógv tosað í Suðuroy um møguleikan at kasta saman í felags lið í bestu deildini.

Stóri glottin hesa ferð er, at fótbóltsfeløgini í Suðuroy sleppa undan verkfallinum, sum so ofta hevur argað tey. TB og VB skulu stríðast um at sleppa undan niðurflytingarplássinum. Støðan er lítið hugalig, og møguligur tapari á Sevmýri í morgin verður heilt illa fyri. Um tað eydnast TB at vinna, so er stórur møguleiki fyri, at teir sleppa undan bæði aftasta og næstaftasta plássinum, meðan VB fyrst og fremst hugsar um at sleppa av aftasta plássinum, áðrenn teir í síðsta umfarinum fáa vitjan av EB/Streymi.



*Ein møguligur tapari á Sevmýri sunnudagin verður heilt illa fyri í stríðnum at sleppa undan niðurflyting*

### Eru væl fyri

Úr Suðuroy er bara gott at frætta, tá ið tað snýr seg um manningarnar. Serliga á miðvøllinum hevur VB verið illa fyri seinastu ferðirnar. Men nú sær betri út. Edvard Ble var leikbannaður seinast. Hann er tøkur aftur. Milan Kulic hevur tvær tær seinastu ferðirnar sitið uttanfyri, tí nøsin er brotin í tveimum støðum. Í hesi vikuni hevur Kulic vant. Um hann er komin seg heilt eftir skaðan, hann hevði heim við úr Íslandi, er kanska ivasamt, men tað er greitt, at hann verður á VB miðvøllinum í morgin. Hann fer at spæla við masku, ið skal verja nøsina.

Palli Augustinussen var heima, tá ið VB spældi móti NSÍ. Palli skuldi koma heim aftur úr Danmark upp undir vikuskiftið.

- Støðan er øllum greið, og vit fyrireika okkum so gott, sum tað ber til. Um vit einki fáa suður aftur við okkum, so verður síðsti møguleikin hjá okkum at sleppa undan beinleiðis niðurflyting at fáa GÍ aftur í síðsta umfarinum. Men tað verður treytað av, at gøtumenn einki fáa á heimavølli móti B36 og á Skála. Tað kunnu vit ikki líta á. Tí mugu vit fyrst og fremst hugsa um at syrgja fyri okkum sjálvum, siga vágbingar.

Á Sevmýri er fótbóltslagið so gott, sum tað kann vera.

- Heimasigrarnir tvær tær síðstu ferðirnar móti GÍ og Skála hava givið nýggjan íblástur til venjingina, umframt at TB ikki longur er á aftasta plássinum. Men vandin er ikki av, og tí er alneyðugt at fáa góða úrtøku móti vágbingum, verður sagt av Tvøroyri. TB skal í síðsta umfarinum spæla í Fuglafirði.

Manningarliga eru teir so væl fyri, sum tað ber til á Sevmýri. Dan Mortensen skuldi undan vikuskiftinum koma heim úr Danmark. Jón Johannesen hevur verið leikbannaður tríggjar tær seinastu ferðirnar. Nú er hann tøkur aftur, og so er er tað upp til venjaran at gera av, um Jón skal fáa pláss millum teir fyrstu ellivu, eftir at TB tvær tær seinastu ferðirnar hevur vunnið.

Hetta er fyrsta ferðin, at VB vitjar á Sevmýri í ár. Í áttanda umfarinum 11. mai vann TB 1-0 í Vági, og í 17. umfarinum 17. juli vann VB 5-1 á TB á Vágseiði.

## Dystaryvirlit

**Fótbóltur - Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 16.10 | HB-KÍ | Dagfinn Olsen |
| 16.10 | NSí-ÍF | Jens Petur Brattalíð |
| 16.10 | TB-VB | Petur Reinert |
| 16.10 | EB/S-Skála | Georg Rasmussen |
| 16.10 | GÍ-B36 | Páll Augustinussen |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 15.10 | GÍ-LÍF | Andrew Christiansen |
| 15.10 | HB-AB | Hans F. Hansen |
| 15.10 | Sumba-Royn | Ransin N. Djurhuus |
| 15.10 | B36-B71 | Dan Højgaard |
| 15.10 | FSV04-B68 | Jens Petur Brattalíð |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 15.10 | EB/S-FSV04 | Jón Sigurd Gleðisheygg |
| 15.10 | GÍ-AB | ÍF |
| 15.10 | KÍ-B36 | Jan á Líðarenda |

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 14.10 | Søljan-Stjørnan | Hallur & Petur |
| 15.10 | Neistin-Kyndil | Eyðun & Andreasen |
| 15.10 | StÍF-VB | Karsetn & Kristian |
| 15.10 | VÍF-Tjaldur | Kristian & Sámal |
| 16.10 | Kyndil-StÍF | Kristian & Sámal |
| 16.10 | Stjørnan-Neistin | Heri & Dánjal |
| 16.10 | Tjaldur-Søljan | Rúni & Ragnar |
| 16.10 | VÍF-VB | Eyðun & Andreas |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 15.10 | Neistin-Kyndil | Eyðun & Andreas |
| 15.10 | StÍF-KÍF | Karsten & Kristian |
| 15.10 | VÍF-H71 | Kristian & Sámal |

# Skreytið skal býtast út

**Í Klaksvík hava kvinnurnar funnið nýtt met, sum tær ætla at seta sær seinnapartin í dag**

1.DEILD KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Í dag verða tveir teir síðstu dystirnir í kvinnukappingini spældir. EB/Streymur og FSV04 hava longu spælt á Mølini, har tað endaði 1-1. Í Gøtu skulu GÍ og AB stríðast um bronsumerkini. GÍ hevur 23 stig, og AB hevur 22 stig.

Í Klaksvík skulu meistararnir úr KÍ og silvurvinnararnir úr B36 spæla, áðrenn gull og silvur krónurnar verða handaðar, og áðrenn KÍ fer at fáa steypið, sum tær nú hava vunnið til ognar. Hetta er sætta árið á rað, at óføru KÍ kvinnurnar eru meistarar.

Tað ræður um at finna nýggjar avbjóðingar, og nú hava tær í Klaksvík sett sær fyri, at vinna FM við fimtan stigum á muni til næsta liðið. Í 2003 var munurin aftur til B68 tíggju stig. Undan uppgerðini í Klaksvík klokkan 15 í dag er KÍ 12 stig frammanfyri B36.

Teir seinastu dagarnar hevur KÍ spælt tríggjar ferðir. 2-2 á Argjum var kanska eitt sindur óvæntað. Síðani vann KÍ 9-1 á heimavølli móti FSV04, og í vikuni vunnu tær útsetta dystin móti GÍ 9-0.

Tá ið málini eru so mong, er møguleiki fyri, at hagtølini ikki altíð vera heilt neyv. Liðformaðurin hjá KÍ, Malena Josephsen, hevur á heimasíðu síni ivaleyst besta hagtalstilfarið, sum er til skjals um kvinnufótbóltin.

# Lagnuløta millum teir næstbestu

**Um tað eydnast toftamonnum at fáa stig við sær burtur úr torføru avbjóðingini í Vágum, verða møguleikarnir fyri beinleiðis uppflyting rættuliga góðir**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Einki verður avgjørt fyrrenn um eina viku í næstbestu deildini. Men B68 skal til próvtøku seinnapartin í dag, tá ið teir skulu spæla á Valloyruni í Sandavági. B71 var til próvtøku har vesturi fyri tveimum vikum síðani, og teir dumpaðu, tí FSV04 vann 3-0. Um B68 einki fær burturúr vágaferðini, og um B71 fer at fáa fulla úrtøku á heimavølli móti B36, so fer uppflytingin aftur at vera í hondunum á sandoyingum.

Tað fær illa verið meiri spennandi í 2. deild, har B68 í síðsta umfarinum skal spæla á heimavølli móti longu niðurflutta GÍ, og B71 skal spæla í Hvalba.

B68 venjarin, Julian Johnsson, fegnast um, at tað nú hevur lagað seg soleiðis, at tað aftur er upp til B68 at gera av, um teir skulu vinna 2. deild og harvið flyta upp. Men hann ásannar samstundis, at tað er alneyðugt at vísa góðan hugburð og stríðast fyri søkini. Úrslitið móti B71 vísti, at FSV04 ikki er at spæla við.

Tá ið B68 vann 6-1 á LÍF, var Ovi Magnussen leikbannaður, og Øssur Hansen noyddist heilt skjótt av vøllinum, tí hann var skaddur. Ovi verður við í dag, og av Toftum verður sagt, at tað eru útlit fyri, at Øssur Hansen eisini verður við.

B68 stuðlar skipa fyri bussferð vestur til Sandavágs seinnapartin í dag.

FSV04 er undan næstsíðsta umfarinum á bronsuplássinum. Teir hava 34 stig og eru tvey stig undan AB, sum skal spæla í Gundadali móti HB. Á Argjum endaði tað 2-2, tá ið HB vitjaði. 0+